

Ólavur Hátún stjórnar Havnarkórinum á konsertini hvítusunnudag.

Stór konsert hvítusunnudag

- Føroya Symfoniorkestur generalprøva fyri fyrstu uttanlandsferðina.

Sunnudagin, hvítusunnudag, kl. 16.00 hava Føroya Symfoniorkestur og Havnarkórið konsert í Norðurlandahúsinum.

Fyrst á skránni er suitan hjá Edvard Grieg "Sigurd Jorsalfar", sum er trý stykki: I kongens hall, Borghilds drøm og Hyldningsmarch.

Edvard Grieg skipaði sjálvur suituna soleiðis, at hon kann brúkast á konsertum. Annars varð tónleikurin upprunaliga gjørdur til sjónleik eftir Bjørnesten Bjørnson. men leikurin fekk lítla undirtøku og eftir stóð Grieg við tónleikinum. Men hann legði so tónleikin soleiðis til rættis, at hann er leysur av sjónleikinum og kann brúkast einsamallur.

Eftir "Sigurd Jorsalfar" kemur "Magnificat" hjá J.S. Bach, longsta verkið á skránni. Ólavur Hátún stjórnar Havnarkórinum. Solistar eru Sanna í Brekkunum, sopranur, Berghild Poulsen, mezzosopranur, Else Paaske, altur, Edvard Ziska, tenorur og Lars Thodberg Berthelsen, bassur.

SIBELIUS TRÝ

Eftir steðgin verður Fiona Clark solistur í "Klaverkonsert nr. 38 í D-dur", "Konsert-Rondo", hjá W.A. Mozart.

Symfoniorkestrið hevur ikki spælt nógvan franskan tónleik, men hesa ferð er "Pavane pour une infante defunte" hjá Maurice Ravel á skránni. Hetta var millum fyrstu verkini, sum gjørdu Ravel kendan. Hann skrivaði tað fyri klaver, men seinni lagaði hann til symfoniorkestur.

Konsertin endar við trimum verkum hjá finska tónaskaldinum Jean Sibelius: Elegie fyri strúkarar úr suituni "Christian 2.", Alla Marcia úr "Karelia suituni" og "Finlandia".


TIL HETLANDS

Annan hvítusunnudag fer Føroya Symfoniorkestur á sína fyrstu uttanlandsferð, við Norrønu til Lerwick. Har skal orkestrið hava konsert týskvøldið í Clickinmin Centre, sum tekur eitt túsund áhoyrarar.

Skráin verður tann sama sum í Norðurlandahúsinum, men tvey føroysk verk eru afturat, "Norska Løva" hjá William Heinesen og ein suita yvir løg hjá Jógvani Waagstein.

Martin Mouritsen stjórnar Føroya Symfoniorkestri, sum telur hálvthundrað tónleikarar.

hd



INDHOLD

Nr. 1 1990

AKTUELT

TEMA: ÅBNING MOD ØST

DEBAT

ANMELDELSER

NÆSTE NUMMER

NORD REVY

Nr. 1 90 TIDSSKRIFT FOR REGIONAL UDVIKLING, NÆRINGSLIV OG MILJØ MAJ

Baltiskt fata morgana

Alla vill till Österuropa, men finns där något att hämta? TEMA s. 29

Hans Magnus Enzensberger:

Slik ville jeg investere Nordens menneskelige kapital KOMMENTAR s. 55

SYNPUNKT

Mare Balticum

Ingen gratis EF-gasik i Nordens utkantsområden s. 6

Nordiskt: Adagens land eller morgondagen vaknar s. 7

Danmark, Island, Sverige: Regionalpolitiken under förvandling s. 14

Nordisk Revy

NÝTT RIT UM BYGDAMENNING

- Norðurlendskt rit viðgerð vinnulív, umhvørvi og bygdamenning

Nord Revy eitur nýtt norðurlendskt tíðarrit um bygdamenning, vinnulív og umhvørvi.

Nordisk institut for regionalpolitisk forskning (NordREFO) eigur tíðarritið og Universitetsforlaget í Oslo gevur tað út. Nordisk Embedsmandskomite for regionalpolitik studlar útgávuni.

Ritstjóri á Nord Revy er danin Lars Hedegaard Jensen, fyrrverandi blaðstjóri á Information. Hann hevur saman við hinum á ritstjórnini lagt dent á at gera eitt tíðarrit, sum á professionellum, journalistiskum grundarlag tænir upplýsing, býti av gjørdum royndum og ikki minst kjakinum um landspartarnar í Norðurlondum og norðurlendskan bygdarmenningarpolitikk.

Nord Revy kemur fýra ferðir í ár og annan hvønn mánað í 1991, 72 síður hvørja ferð. Ritið verður skrivað á donskum, norskum og svenskum og harafturat er samandráttur á enskum. Tema í fyrsta rituum er vaksandi áhugin í Skandinavia fyri størri sambandi við baltisku lýðveldini og Sovjettsamveldið.

Haldaratekning er hjá Universitetsforlaget, Abonnementsseksjonen, Tøyen, N-0608 Oslo 6, Norge.

hd

Klaverkonsert á Skála

- Hóskvøldið ber til at hoyra ein hin besta norska sopranin í Norðurlandahúsinum

Í kvøld kl. 20.00 hevur norski klaverspælarin Einar Henning Smebye konsert í Skála skúla.

Hann er komin til Føroya saman við sopraninum Anne-Lise Berntsen og tey hava konsert í Norðurlandahúsinum í annaðkvøld kl. 19.30. Tey hava júst havt konsertir í Malmö og í Tivoli í Keypmannahavn.

Skráin 31. mai í Norðurlandahúsinum

Jean Sibelius
Drømmen (J.L. Runeberg)
Men min fågel (J.L. Runeberg)
Sen har jag ej frågat mera (J.L. Runeberg)
Svarta Rosor (E. Josephson)

Fartein Valen
Ave Maria (1921)

Modest Musorgskij
Dødens sanger og danser
(A. Golenisjtsjev-Kutosov)
Vuggevise
Serenade
Trepak
Feltherren

Richard Strauss
Zueignung (H. von Gilm)
Die Nacht (H. von Gilm)
Allerseelen (H. von Gilm)
Das Rosenband (Klopstock)
Cæcilia (H. Hart)

Johan Kvandal
Norske Stevtoner op. 40
Mine visur
Då eg var liti
Eg var meg ut på Gladheimsberg
Hjurringsvise og lokk
A huge mi
A her møter mangt
Liti-mor
Då eg var liti og sprang utivi
Sjugurd og kjerringi
A med Soli kan eg
Guten og jenta